# 1000 sms til føroyska lurtarin

**Hósdagin 24. november gevur bólkurin The Message fyrstu fløguna út, og teir fýra limirnir lova, at hetta er nýbrot innan føroyskan tónleik**

FLØGUÚTGÁVA
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



Teir eru ungir, teir eru lekrir, teir eru gávuríkir og saman eru teir ”The Message”. Tað er sjáldsamt, at ein fløga kemur á marknaðin uttan, at nakar veit av, at hon er á veg, og tað er enn meira sjáldsamt, at ein fløga kemur á marknaðin uttan, at nakar veit av, at bólkurin aftanfyri fløguna er til, men hetta hendur nú.

Janus Rasmussen úr Lama Sea, Benjamin Petersen úr All That Rain, Ben-jammin og bólkinum hjá Brandi Enni, Frans Galán úr Sic og 48Pages og Sveinur G. Olsen úr Flux, hava í tí dulda stovnað ein bólk og spælt eina fløgu inn. Bólkurin eitur ”The Message” og fløgan eitur ”1000sms”. Enn vilja teir einki siga um tónleikastíl, men lova á heimasíðuni HYPERLINK ”http://www.1000sms.fo” www.1000sms.fo, at talan er um nýskapan innan føroyskan tónleik, og fløgan hevur ein sterkan boðskap um nýbrot.

Teir skriva ”At tónleikarar kasta saman við eini serligari útgávu fyri eyga, er okkum kunnugt nýbrot í føroyskum tónleikalívi. Vit elska nýbrot, og tað er júst hetta, ið nýggja útgávan 1000sms er. Men fyri okkum fýra í The Message er útgávan fyrst og fremst ein alneyðugur boðskapur, ið vit vilja senda út í allar ættir.

Hugsjónarliga stremba vit fyrst og fremst eftir, at útgávan skal bloyta upp forðingar, ið vit dagliga kenna á okkum her á landi. Vit vilja hava teg og øll onnur í Føroyum at samskifta tvørtur um kendar avmarkingar um alt tað, ið liggur tykkum á hjarta. Og tað er júst hetta evnið, okkara tónleikaliga íkast snýr seg um.

Vit fýra eru samdir um, at vit ikki tulka útgávuna sjálvir. Hana sleppa fólk sjálv at døma. Hinvegin vóna og vænta vit, at hon í stóran mun fer at flyta mørk. Einki skal longur vera tað sama, tá ið »1000sms« er komin á marknaðin”

Útgávan verður á marknaðinum hósdagin 24. november.




# Trygg á leiðini

Lívið er ljóst og vakurt. Brádliga hendir tað, og alt broytist.

Onki er so virðismikið sum lívið og ein góð heilsa. Ein vanlukkutrygging tekur hond um tað dýrabarasta, vit eiga.

Hjá børnum fevnir tryggingin eisini um ymiskar barnasjúkur.

Tú kanst tryggja teg alt samdøgrið ella í frítíðini.

Tryggingin kann nýtast aðrastaðni enn í Føroyum. Tú kanst fara út í allan heim við henni.

Velur tú eina vanlukkutrygging, kunnu vit hjálpa tær fíggjarliga. Tryggingin er eitt trygdarnet fyri teg og alla familjuna, og ein íløga í framtíðina.

Ring til okkara á tel 345600 ella far inn á www.trygging.fo og fá nærri at vita, hvussu vit kunnu hjálpa tær.

## Til tín

Árið út bjóða vit tær privata vanlukkutrygging, íroknað barnavanlukkutrygging, fyri hálvan prís fyrsta árið.

Ring til okkara á 345600 og hoyr nærri.

**Hálvt gjald fyrsta árið!**

Kongabrúgvin, Postboks 329, FO-110 Tórshavn, Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
*- so ert tú tryggari*



# Havnar Bio

kall Coca-Cola




**History of Violence**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadag | 14.11 | kl. 19.45 | kl. 22.00 |
| Týsdag | 15.11 | kl. 19.45 | kl. 22.00 |
| Mikudag | 16.11 | kl. 19.45 | kl. 22.00 |
| Hósdag | 17.11 | kl. 19.15 | kl. 21.30 |

NO ONE GETS OUT ALIVE




**Doom**

| | | |
|---|---|---|
| Mánada | 14.11 | kl. 22.15 |
| Týsdag | 15.11 | kl. 22.15 |
| Mikudag | 16.11 | kl. 22.15 |
| Hósdag | 17.11 | kl. 22.30 |




**Walter & Trofast**

| | | |
|---|---|---|
| Mánadag | 14.11 | kl. 17.30 |
| Týsdag | 15.11 | kl. 17.30 |
| Mikudag | 16.11 | kl. 17.30 |
| Hósdag | 17.11 | kl. 17.00 |




**Legenden om Zorro**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadag | 14.11 | kl. 19.30 | |
| Týsdag | 15.11 | kl. 19.30 | |
| Mikudag | 16.11 | kl. 19.30 | |
| Hósdag | 17.11 | kl. 19.45 | *Seinasta sýning* |




**Far til fire gi'r aldrig op!**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadag | 14.11 | kl. 17.15 | |
| Týsdag | 15.11 | kl. 17.15 | |
| Mikudag | 16.11 | kl. 17.15 | |
| Hósdag | 17.11 | kl. 17.30 | *Seinasta sýning* |

**KOMANDI FILMUR:**




*HEIMSFRUMSÝNING*

**Harry Potter og flammernes pokal**

Fríggjadag 18.11. kl. 00.04 kl. 16.30 kl. 19.45 kl. 23.00

**www.bio.fo • Telefon 31 19 56**

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**